# Ikki Turkaland

Týski samveldiskanslarin, Angela Merkel, er framvegis ímóti, at Turkaland skal fáa limaskap í ES. Hinvegin fer hon ikki at forða fyri, at samveldið kann tingast við turkar um limaskap, men ein tilsøgn um tingingar skal ikki vera nøkur trygd fyri limaskapi. Tað segði Angela Merkel, eftir at hon hevði havt ein fund við turkiska forsætisráðharran, Recep Tayyip Erdogan, í Ankara í gjár. Fyrr hevur franski forsetin, Nicolas Sarkozy, sagt, at hann vil ikki hava Turkaland upp í ES. Sambært Merkel og Sarkozy er Turkaland ikki ein náttúrligur partur av evropeiska marknaðinum.



# 21 mia. til Haiti

ST fer í vikuni at biðja um 21 milliardir krónur, sum skulu brúkast til at endurbyggja ein part av tí, sum fór í jarðskjálvtanum í Haiti tann 12. januar. Umbønin verður løgd fram á einum fundi í morgin, har meiri enn 100 lond eru umboðað, og sum forsetin í Haiti, Rene Preval, Ban Ki-moon, ST-aðalskrivari og amerikanski uttanríkisráðharrin, Hillary Clinton, hava fyrireikað. Myndugleikarnir í Haiti og útlendskir serfrøðingar hava roknað seg fram til, at jarðskjálvtin gjørdi skaða fyri meiri enn 44 milliardir krónur.



*Hesir fýra hjá Føroya Tele fylgja væl við gongdini vestan fyri Hetland og oljuvirkseminum í Norðrsjónum og Føroyum fyri tað. Teir kunnu fyribils gleðast um, at tað hevur gingið væl við fyrstu royndini at samstarva við altjóða oljuvinnuna. Nú leggja teir so til brots aftur. Fv. Erik E. Thomsen, Páll Vesturbú, Brian Rosendahl og Tórur Jørgensen*

Mynd Jan Müller

data frá útgerð umborð send via Shefa, eisini verður tað javnan brúkt til videokonferansur og nú skulu teir til at seta kamera á boridekkinum umframt at øll boridata verða send umvegis Shefa til støðirnar á landi. Tórur Jørgensen er annars jaliga ófarin av, hvussu nógv verður gjørt fyri trygdina umborð á oljupallum. Tað kenst væl, at tað verður so væl farið um.

### Shefa ein kollvelting

Eisini stjórin í FT Net er fegin um gongdina, har Føroya Tele hevur fingið samstarvsfelagar innan altjóða oljuvinnuna. Avtalan við BP kom eftir, at Shefakaðalin varð lagdur úr Føroyum og víðari til Hetland, Orknoyggjar og Skotland. Á vegnum varð so fingið samband við oljustøðini Clair og Schiehallion. Sambandið hevur koyrt síðani uttan trupulleikar.

– Haldi ikki eg taki munnin ov fullan, tá eg sigi, at eisini BP er væl nøgt við samstarvið higartil. Áðrenn Shefasambandið kom varð fylgisveinasamband brúkt, og tað var so nøktandi tá. Men nú teir hava fingið Shefasambandið er tað vorðið so mikið nógv betri. Tá teir so onkuntíð av trygdarávum hava sløkt niður fyri Shefa fyri at royna tað gamla sambandið, so hevur tað víst seg, at nú er tað als ikki nøktandi. Tað var eitt rama skríggj umborð tá. Nú mugu teir hava Shefa. Talan er í slíkum føri eisini um eina langtíðaravtalu um leigu av fipurleiðingi, sum gongur í 15 ár. Síðani er eisini talan um eina kapasitetsavtalu yvir 5 ár.

### Føroya Tele fylgir gongdini

Seinastu tíðina hava vit frætt, at stórar íløgur skulu gerast í bæði olju og gassframleiðslu vestan fyri Hetland komandi árini. Vit spurdu Páll Vesturbuð, hvussu Føroya Tele fyrireikar seg til at kunna veita vørur og tænastur í tí sambandi.

Hann sigur, at Føroya Tele roynir at fylgja væl við í tí, sum hendir bæði hjá BP og øðrum oljufeløgum og royna tey at hava samband við partarnar. –Vit hava sæð, at tað at hava fingið BP sum kunda á Shefakaðalinum, hevur verið sera gott fyri okkum sum eitt ískoyti til fígging av kaðalinum. Vit ynskja øgiliga nógv at fáa fleiri líknandi kundar har í økinum í sambandi við, at fleiri øki fara undir framleiðslu. Alla staðni har tað ber til vilja vit royna at bjóða okkum fram sum veitarar av góðum telesambandi.

Stjórin í FT Net sigur víðari, at tað innan hesa vinnuna er ein góð inntøkukelda at veita gott samband til oljupallar. Nógva aðrastaðni er stór kapping um at veita hesa tænastu, og har veitarar longu hava sett seg á marknaðin er ringt at koma inn, men vestan fyri Hetland er Føroya Tele enn einsamalt, so har hava tey nakrar fyrimunir.

### Hørð kapping í Norðsjónum

– Tað skilst, at tit hava eisini roynt at selt tykkara fipurloysnir í Norðsjónum, men har hava tit fingið harða kapping frá eitt nú norskum fyritøkum, sum bjóða út radiosamband, ið er bíligri enn pipursamband, tí tað kostar nógv at leggja fipurleiðingar.

– Norðmenn hava longu samband til pallar har á leiðunum, og tá ber tað so til at koma við radiosambandi víðari til teir nýggju pallarnar, sum verða bygdir aftrat tó innan fyri eitt ávíst øki, og tá er tað trupult at etablera okkum við fipurloysnum.

Páll Vesturbú leggur tó aftrat, at teir arbeiða eisini við at kunna bjóða radiosamband vestan fyri Hetland til summi av teimum nýggjum støðunum og her serstakliga royndarboringar, sum verða gjørdar.

### Liggja framvið frá byrjan

Nú Total og Dong fara undir sína stóru útbygging av gassfeltunum vestan fyri Hetland, so roynir Føroya Tele eisini at vera við í teimum heildarloysnunum, sum verða gjørdar har. Talan er nevniliga ikki at brúka framleiðslupallar og -skip, tá gassfeltini Laggan og Tormore verða útbygd. Tá verður nýggja tøknin við fult automatiskum útbúnaði á havbotninum brúkt, og tí er tað av stórum týdningi at vera við longu frá byrjan, tá heildarloysnirnar verða gjørdar á tekniborðinum og síðani bodnar út. Tá er alt integrerað, eisini samskiftisparturin. Føroya Tele hevur so eisini ein dreym um at kunna veita fipurloysnir millum Aberdeen og størsta olju- og gassterminalin í Europa, Sullom Voe, ið liggur í Hetlandi.

Og hóast nógv er at hugsað um í hesum førunum, so verður eisini frá FT Net fylgt væl við, hvat hendir skamt frá markinum, har tvær stórar úbyggingarætlanir eru í stoypiskeiðini, nevniliga oljukeldurnar Rosebank og Cambo. Tá hesar verða útbygdar helst við bæði útbúnaði á havbotninum og framleiðslu- og goymsluskip (FPSO, red.) á staðnum, so verður eisini har stórur tørvur á góðum og skjótum samskiftissambandi. Og her vil Føroya Tele so bjóða seg fram bæði við fipur- og radioloysnum.

### Brynja seg til Føroyaøkið

*– Og nú oljuleitingin og framleiðslan nærkast føroyska markinum, hava tit so eisini gjørt tykkum tankar um at kunna veita tænastur til møguligar oljustøðir her, um so er at olja og gass verður funnið?*

– So skjótt tað verður ítøkiligt at seta pallar upp á føroyskum øki eisini vilja vit bjóða okkum fram at veita loysnir og sjálvandi brúka okkara royndir frá vestan fyri Shetland.

Umframt at veita tænastur til oljuvinnuna til havs vestan fyri Hetland hevur Føroya Tele eisini tætt samstarv við eitt nú myndugleikarnar í Hetlandi um eina ætlan at leggja eina fipurleiðing frá staðnum, har Shefa fer í land í Hetlandi og víðari til høvuðsstaðin Lervick.

## Føroysk vinna við í útbygging vestan fyri Hetland



*»Talan um eina so mikið stóra útbyggingarætlan sum tvær av heimsins størstu oljufyritøkum, TOTAL og BP fara undir vestan fyri Hetland komandi árini, at kanska áttu føroyskir veitarar av vørum og tænastum til kolvetnisvinnuna at ligið framvið at kanna møguleikarnar. Fjarstøðan er ikki long, og fleiri føroyskir veitarar hava prógvað sítt dugnasemi, so teir hava eitt gott útgangsstøði í so máta.«*

Petur Joensen, stjóri í Jarðfeingi í Sosialinum í mars 2010